## Eingin keypir bil

Fíggjarkreppan í Íslandi ger, at íslendingar eru at kalla givnir at keypa bilar. Hagstovan í Reykjavík sigur, at í november vórðu 123 bilar skrásettir fyri fyrstu ferð, og so lítið hevur hetta tal ikki verið, síðani hagstovan fekk uppgávuna í 1995. Ellivu teir fyrstu mánaðirnar í ár vórðu 12.231 nýggir bilar skrásettir, og tað er 42,3 prosent færri enn somu mánaðir í 2007. Hinvegin vísa hagtølini, at íslendingar brúka gjaldskortið meiri nú enn fyrr. Frá januar til oktober brúktu teir gjaldskortið 3,9 prosent meiri enn somu mánaðir í fjør.

## Studentaskúli í Klaksvík fyri ítróttarfólk

Klaksvíkar - Norðoya - kommuna kann bjóða seg fram at byrja komandi skúlaár og søkja um loyvi frá Mentamálaráðnum at hava 5 royndarár við studentaskúla fyri ítróttarfólk, skrivar Magna Thomassen, lærari í grein í bløðunum. Klaksvík hevur bestu tilboð og umstøður til okkara ítróttarungdóm, ið ynskir at taka studentsprógv og samstundis mennast ítróttarliga. Um Klaksvík bjóðar seg fram at taka inn 4 flokkar á studentaskúla, so kann tað lættliga lata seg gera, um gjørt verður sum í øðrum londum, har teir yngstu flokkarnir eru í smáum eindum fyri seg sjálvar. Sambært Magnu Thomasen kann Klaksvíkar - Norðoya - kommuna bjóða seg fram at byrja komandi skúlaár og søkja um loyvi frá Mentamálaráðnum at hava 5 royndarár við studentaskúla fyri ítróttarfólk.- Uttan iva er ein slíkur studentaskúli eitt stórt ynski hjá okkara ungdómi, og ongastaðni liggur hann betur enn mitt í ítróttarbýnum Klaksvík, sigur hon.

Føroyingur búð í Ný Foundlandi í 20 ár:

# - Eg vil heimaftur til Føroya

**Føroysku rækjuskipini, sum hava verið útistongd í kanadisku havnunum í longri tíð, hava týdning fyri Ný Foundland, nú tey aftur kunnu leggja veiðina upp og keypa útgerð har yviri. - Men tað er stórur munur á nú, og tá nógv skip, eitt nú føroysku saltfiskalínuskipini, komu higar. Tá høvdu ikki bara landararnir arbeiði, men eisini tey, sum stóðu við barrdiskarnar, sigur havnarmaðurin, Martin Andreasen brosandi**

SAMRØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



53 ára gamli Martin Andreasen úr Havn hevur búð yviri í Harbour Grace í Ný Foundlandi í 20 ár. Hann er giftur har yviri, og Martin og konan eiga saman eina 17 ára gamla dóttir. Kona og dóttir hava bert verið í Føroyum einaferð øll hesi ári, men Martin plagar sjálvur at vera í Føroyum umleið triðja hvørt ár, tá skipið, hann er við, er á beding.

- Eg fylgdi við rækjutrolaranum Fame í sínari tíð, tá hann endaði í Kanada. Helmingurin av manningini skuldi vera kanadisk og helmingurin føroyingar.

Martin sigur, at í eitt ella hálvt annað ár sigldi hann har yviri og ferðaðist millum Kanada og Føroyar, men sum tíðin leið, fann hann sær konu í Ný Foundlandi. Tey búsettu seg í Harbour Grace, har nógvir føroyingar gjøgnum ár og dag hava verið.

### Verfaðir fiskimaður

- Pápi til konu mína er úr St. Pier í Ný Foundlandi, sum er franskt. Hann sigldi í sínari tíð saman við fleiri føroyingum í Kanada, eitt nú við Hvítanesi og Hviltenni. Honum dámdi væl føroyingarnar, og teir hildu nógv av honum. Verfaðir kennur soleiðis nógvar føroyingar, sum framvegis vitja hann, tá teir eru í landi. Ein føroyskur fiskimaður var soleiðis og vitjaði hann í gjár, tá eg tosaði við hann í telefon. Verfaðir plagar at fáa tár í eyguni, tá hann sær føroyingarnar aftur.

Spurdur, um aðrir føroyingar eisini búgva um hansara leiðir í Ný Foundlandi, sigur Martin, at hovbingurin, Arnbjørn Hammer, er ein – og Hallur Anthoniussen av Toftum ein annar.

- Tað er stuttur teinur ímillum okkum tríggjar, kanska einar 10 minuttir í bili til Hall, sum býr í býnum Carbounear. Arnbjørn býr eisini her í Harbour Grace, sum er ein býur við eini 5.000 fólkum. Vit síggjast javnan, tá vit eru heima í senn.

Martin sigur, at Arnbjørn var ein av monnunum, sum í síni tíð fylgdu við Fame til Kanada, men hann búsetti seg seinni í Harbour Grace.

- Hallur siglur við gamla Ango. Hann er giftur, og tey eiga eina dóttir.

Hann vísir á, at tá føroysk skip eru inni í Ný Foundlandi, fáa teir javnan vitjan – og ofta eisini føroyskan mat frá føroysku sjómonnunum.

- Arnbjørn hevði soleiðis fingið turran fisk og spik í vikuni, nú føroysk skip eru inni har yviri.

### Rækjur og svartkalvi

Martin Andreasen siglir við einum stórum kanadiskum/donskum rækjubáti við toftamanninum, Williami Hansen, sum skipara.

- Atlantic Enterprise er ein lutfalsliga nýggjur bátur, sum lastar eini 670 tons av rækjum – ella eini 1000 tons av svartkalva.

Hann sigur, at skipið í ár hevur havt loyvi at fiskað 7.000 tons av rækjum og stívliga 2.000 tons av svartkalva – alt í kanadiskum sjógvi.

Martin siglir vanliga sum verksmiðjuleiðari, men hevur eisini eina navigatiónsútbúgving, sum liggur onkustaðni ímillum heimaskipara og skipara – eftir føroyskum mátistokki.

- Eg eri onkran túr við sum stýrimaður, men mær dámar betri á verksmiðjuni enn á brúnni.

Hann letur annars væl at gongdini við fiskiskapi í kanadiskum sjógvi, og hann letur eisini væl at inntøkuviðurskiftunum hjá manningini.

- Vit eru nakrir umborð, sum eru fastløntir. Tú kanst altíð hugsa tær meira, enn tú fært, men vit hava góða fortjenastu. Eg vænti, at parturin hjá dekkara í ár man liggja um einar 400.000 krónur.

Túrarnir hjá Atlantic Enterprise liggja vanliga um einar 3-4 vikur hvør, og menn eru vanliga umborð í tveir túrar – og síðan í landi í tveir. Tá teir eru á svartkalvaveiði, kunnu túrarnir

*„… Tað er væl bíligari at liva í Harbour Grace, enn tað er í Føroyum, og skatturin har er eisini væl lægri. Bensin og olja kosta umleið ein helming av tí, tey kosta í Føroyum…*